Búskapur og vinna:
## Asfaltgøla

Í Svøríki vilja kappingarmyndugleikarnir vera við, at vantandi kapping á asfaltmarknaðinum hevur kostað svensku skattgjaldarunum umleið eina mia. krónur. Sambært kappingarmyndugleikunum hevur tann vantandi kappingin havt við sær, at tey stóru byggifeløgini hava avtalað prísirnar, og tað er ólógligt.

Í síðstu viku viðgekk stóra byggifelagið NCC, at tað hevur samskipað prísirnar á asfaltarbeiði í fleiri ár, og nú verður hildið, at onnur stór byggifeløg so sum Skanska og Peab hava gjørt tað sama. Fleiri onnur minni feløg eru eisini undir illgruna.

Kanningarnar hjá kappingarmyndugleikunum hava nú eisini elvt til, at tað almenna vegaverkið er komið undir illgruna, tí hildið verður, at vegaverkið hevur goldið ov nógv fyri asfaltarbeiði, sjálvt um leiðslan hevur vitað, at prísurin var og høgur.

Fleiri svenskar kommunur hava boðað frá, at tær fara í rættin fyri at fáa endurgjald fyri tann ólógliga høga prísin, sum sigst hava verið umleið 25 prosent oman fyri tann veruliga prísin.

## 500 mió. afturat

Seinastu dagarnar hevur leiðslan í skandinaviska flogfelagnum SAS tingast við fakfeløgini hjá starvsfólkunum um, hvussu felagið kann spara tær tríggjar mia. krónurnar, sum leiðslan hevur samtykt at spara.

Tingingarnar hava gingið væl, og í gjár varð boðað frá, at nú er eftir at finna tær seinastu 500 mió. krónurnar. Leiðslan roknar við at røkka helminginum við at spara útreiðslurnar til teirra, sum arbeiða umborð á flogførunum. Í hesum bólkinum hava 179 longu fingið uppsagnarbræv.

UTTAN ÚR HEIMI

# Ætlaðu at myrða Clinton


*Bill Clinton*
*Mynd: Reuters*

**-Vit hava roynt at myrða Bill Clinton, men tað miseydnaðist**

ALTJÓÐA YVIRGANGUR
*Árni Joensen*

- Vit hava roynt at myrða Bill Clinton, men tað miseydnaðist.

Hetta er orðaljóðið í einum hondskrivaðum skjali, sum er funnið í leguni Shomali uttan fyri suðurafghanska býin Kandahar. Felagsskapurin hjá Osama bin Laden, al-Qaeda, helt til í hesari leguni.

Skjalið er skrivað á arabiskum, og saman við tí vóru ymsar tekningar. Tey, sum hava sæð skjalið, siga, at innihaldið bendir á, at ætlanin var at myrða fyrrverandi amerikanska forsetan í sambandi við onkra altjóða ráðstevnu ella ein toppfund. Eingin dagfesting er á skjalinum, men hildið verður, at morðætlanin skuldi setast í verk fyri tveimum árum síðani. Tað ber ikki til at síggja, um ætlanin varð avlýst, ella um okkurt kom í vegin.

Ein amerikanskur trygdarserfrøðingur í Kabul, Keith Indena, vil vera við, at al-Qaeda hevði eisini lagt eina aðra morðætlan ímóti Bill Clinton, og at forsetin ta ferðina skuldi myrðast, tá hann var í einari golfkapping.

- Vit síggja í skjølunum upplýsingar um, hvussu trygdarskipanin kring forsetan var, sigur Keith Indena. Hann sigur, at í skjølunum sæst eisini, at al-Qaeda kannaði trygdarskipanina hjá Secret Service ógvuliga gjølla.

Sambært trygdarserfrøðinginum hevði júst ein golfkapping verið væl egnað til morð, tí undir slíkum umstøðum er trygdin ikki so umfatandi, sum tá forsetin er á vitjan onkunstaðni.

Keith Indena sigur, at al-Qaeda hevði eisini neyvar upplýsingar um, hvussu bilafylgið hjá Clinton forseta plagdi at vera skipað. Aftan fyri sjálvan forsetabilin koyrdi altíð ein bilur við alvápnaðum trygdarmonnum, og sambært Keith Indena ætlaði al-Qaeda at søkja at hesum bilinum fyrst og síðani bilinum, sum forsetin var í.

# Trygdin á Mærsk-pallunum skal kannast

**Eftir tær álvarssomu atfinningarnar frá teimum, sum arbeiða á oljupallunum hjá Mærsk í Norðsjónum, hava myndugleikarnir gjørt av at kanna viðurskiftini**

OLJUVINNA
*Árni Joensen*

Tað er sjálvur vinnumálaráðharrin, Bendt Bendtsen, sum hevur tikið avgerð um at kanna trygdina á oljupallunum hjá Mærsk.

Bendt Bendtsen sigur, at trygdin á teimum donsku olju- og gasspallunum í Norðsjónum skal vera í lagi, og at tað er umráðandi at kanna viðurskiftini til botns alt fyri eitt.

Hann hevur tí gjørt av at skipa so fyri, at trygdarviðurskiftini verða kannað beinanvegin. Ráðharrin leggur dent á, at talan er um eina óvilduga kanning, og tí er kenda norska felagið Det Norske Veritas biðið um at gera kanningina.

Felagið skal kanna allar atfinningarnar, sum arbeiðsfólk á pallunum hjá Mærsk eru komin við.

Kanningin skal verða liðug um tveir ella tríggjar mánaðir, og úrslitið verður avgerandi fyri, um myndugleikarnir fara at taka onnur stig, sigur Bendt Bendtsen, vinnumálaráðharri.

Tey, sum arbeiða á pallunum hjá Mærsk í Norðsjónum, hava m. a. víst á, at viðlíkahald er at kalla einki, og at felagið støðust gevur boð um at økja framleiðsluna, hóast pallarnir eru gamlir og illa farnir orsakað av tí vantandi viðlíkahaldinum.

Úr Norðurlondum:
## Dýrur borgarstjóri

Tann umstríddi borgarstjórin í donsku kommununi Farum, Peter Brixtofte, er nú rættiliga komin í eldin, eftir at blaðið BT sigur seg kunna skjalprógva, at borgarstjórin hevur snýtt sína egnu kommunu fyri fleiri milliónir krónur.

Blaðið hevur m. a. fingið fatur á skjølum, sum vísa, at borgarstjórin nýtti meiri enn 60.000 krónur á einum matstaði, har hann og tríggir aðru fingu sær ein bita. Rokningina skuldi matstovan senda kommununi. Dagin eftir rindaði kommunan aðrar 83.000 krónur fyri líknandi rokningar.

Peter Brixtofte, sum eisini er fólkatingsmaður hjá Vinstra, hevur verið umstríddur í fleiri ár, tí hann stýrir Farum kommunu á ein sermerktan hátt, sum ferð eftir ferð hevur fingið kommunala eftirlitið upp úr stólinum. M. a. hevur kommunan selt sínar skúlar og vatnverkið, sum kommunan síðani leiðar aftur. Og ítróttarøkið í kommununi, sum er tað mest framkomna í Danmark, er fingið til vega við ivasomum verkætlanum.

Higartil er borgarstjórin sloppin undan myndugleikunum, men hesaferð eru ákærurnar av tí álvarssama slagnum.

## Dýrari hús

Eitt yvirlit hjá norska húsasølufelagnum vísir, at tað er vorðið dýrari at keypa sær hús ella íbúð í seinastuni.

Yvirlitið vísir, at prísurin á vanligum sethúsum hækkaði 6 pro sent frá desember til januar.

Íbúðarprísurin hækkaði uppaftur meiri. Frá desember til januar hækkaði prísurin á íbúðum 8 prosent, og frá januar í fjør til januar í ár var prísvøksturin heili 16 prosent, sigur norska húsasølufelagið.



# Skála fyrireikar seg til olju


*À Skála eru tey farin at fyrireika eitt havnaøki ið røkkur líka frá Skipasmiðjuni, norður ímóti Skálabotni.Tilsamans kunnu fleiri hundraðtúsund fermetrar av havnaøki útvegast*

**Skála Kommuna hevur tikið stig til fyrireika eitt stórt øki til havnalag. Verður tað neyðugt, kann nýggja havnalagið verða fleiri hundraðtúsund fermetrar**

ÚTBYGGING
*Áki Bertholdsen*

Í fyrstu atløgu vunnu Runavíkingar slagið um at gerast føroysk oljuhavn. Men á Skálafjørðinum hava tey ikki slept vónini um, at tey fara at varðveita oljuvinnuna har inni.

Í øllum førum ætla tey ikki at vera tikin á bóli, so vánaligar umstøður skulu vera tað, sum ger, at oljuvinnan gleppur teimum av hondum.

À Skála, sum leggur saman við Runavíkar Kommunu um nøkur ár, eru tey eisini farin at fyrireikað seg til oljuvinnuna.

Kári Johannesen, borgarstjóri, sigur, at bygdaráðið er farið undir at endurskoðað byggiætlanina fyri kommununa.

Endamálið við tí er at leggja eitt stórt økið á Skála av til havnaøki.

Hann sigur, at tey eru farin í holt við skitsurnar til tað nýggja havnaøkið.

Hetta er eitt havnaøki, sum ið røkkur líka frá Skála, norður ímóti Skálabotni.

Hann sigur, at umstøðurnar at gera havnaøkið har eru avbera góðar, Tað er slætt og tað skal ikki fyllast rættiliga langt út, áðrenn dýpið verður 10 metrar.

Hvussu stórt hetta øki er, veit hann ikki enn, men møguleikar eru fyri at gera eitt havnaøki upp á fleiri hundrað túsund fermetrar, verður tað neyðugt.

Kári Johannesen dylir ikki fyri, at hetta er fyri at ganga krøvunum frá oljuvinnuni á møti, verður Skálafjørðurin oljuhavn.

Men hann leggur eisini dent á, at tað er ikki so, at Kommunan fer fer undir at gera havnaøki.

Skála- og Runavíkar kommuna hava ikki møguleikar at fara undir eitt so stórt havnalag. Men vit ætla at leggja økið av til havn, so at vit hava tað at vísa oljufeløgunum á.

– Skal nakað gerast har, verður tað í samstarvi ímillum kommununa og aðrar íleggjarar, eitt nú oljufeløgini, tí tilsamans verður talan um útbyggingar fyri hundraðtals milliónir. Tað, sum kommunan sjálv fer at gera av havn, verður bara okkurt smávegis, sum hon hevur ráð til.

Kommunan er í løtuni í ferð við at gera havnalag í sambandi við Skipasmiðjuna. Ein partur av tí er gjørt fyri 1,7 miillión og nú er ein partur eftir, sum kostar áleið tað sama, kanska eitt sindur meir. Men á fíggjarætlanini í ár er onki sett av til havnaútbygging, tí í ár verður útstykking til grundstykki raðfest hægri.

Hann sigur, at tekur ein verulig oljuivinna seg upp, verður brúk fyri einum øki uppá 10-15.000 fermetrar fyri hvørt borihol, so tað kann so skjótt vera, at tørvur er á einum veldugum havnaøki, sigur Kári Johannesen og tað, sum kommunan ætlar, er at hava eina fullfíggjaða ætlan fyri, hvussu tað kann gerast.

# Leiðari settur til útibarnagarð


*Í allar nærmastu framtíð byrjar útibarnagarður í Missiónshúsinum í Æðuvík, men seinni flytir hann til Lamba*

**Í næstum byrjar útibarnagarður í Æðuvík til 25 børn**

BARNAANSING
*Áki Bertholdsen*

Runavíkar Býráð hevur nú sett leiðaran til útibarnagarðin, sum ætlanin er at seta á stovn.

Tað er Kára Løkin, ið er settur sum leiðari fyri útibarnagarðin. Tað var ikki ein starvssetan, sum voldi Býráðnum serligar trupulleikar, tí tað bara hendan eina umsóknin. Og tá ið hon harafturat var væl skikkað til starvið, var í roynd og veru bara talan um eitt avgreiðslumál.

Kára Løkin er 40 ára gomul og petagokur við drúgvum arbeiðsroyndum.

Ætlanin var upprunaliga, at hesin útibarnagarðurin skuldi vera í gamla skúlanum í Lamba. Men arbeiðið at byggja hann um, er seinkað og tí verður barnagarðurin í Missiónshúsinum í Æðuvík, til húsið í Lamba er liðugt.

Tað verður pláss fyri 25 børnum í nýggja útibarnagarðinum. Søkt er eisini eftir hjálparfólki til barnagarðin og ætlanin er at lata hann upp sum skjótast, helst í hesum mánaðinum,.

Rodmund Nielsen, borgarstjóri í Runavík, sigur tað standa yvir 60 børn á bíðilista eftir at fáa ansing í Runavíkar Kommunu.

Annars hevur kommunan barnagarð til 54 børn. Men hann verður nú niðurlagdur og ístaðin verður nýggjur barnagarður bygdur til 90 børn. Tann barnagarðurin verður liðugur fyrst í komandi ári.

Umframt barnagarð, hevur kommunan eisini yvir 80 børn í dagrøkt.

Rodmundur Nielsen sigur, at tá ið nýggi barnagarðurin er liðugur, fer tað at líða heilt væl, at tørvurin er nøktaður.

# Mugu bíða eftir spæliplássi

SPÆLIPLÁSS
*Áki Bertholdsen*

Skálafólk mugu bíða eitt sindur enn eftir at fáa spælipláss í bygdini.

Tað vóru nøkur fólk, sum høvdu søkt um at fáa eitt stykki til spælipláss, men hesum ætlar kommunan at bíða við.

Talan er um tey, sum búgva í býlinginum Útí á Fløtum, sum høvdu søkt um eitt stykki til spælipláss.

Fyri nógvum árum síðani, áðrenn byggiætlan varð gjørd, hevði ein maður fingið loyvi at byggja á einum stykki. men tað hóskaði ikki væl saman við byggiætlanini, sum kommunan og hann gjørdu gerabýti, so at kommunan fekk stykkið frá honum og hann fekk eitt annað stykki ístaðin.

Hetta stykki, sum kommunan fekk aftur, ætlaðu fólkið í grannalagnum nú at fáa til spælipláss.

Men borgarstjórin, Kári Johannesen, sigur, at tað er eitt annað øki í byggiætlanini, sum er sett av til spælipláss og bygdaráðið er tí ikki sinnað at lata tey fáa tað gamla grundstykki til spælipláss í fyrstu syftu. Nú er so ætlanin at kanna møguleikar fyri at gera stykkið til spælipláss, sum er sett av til endamálið.

– Men verður tað ov dýrt, er onki til hindurs fyri, at tey fáa tað gamla grundstykki, so talan er ikki um, at kommunan noktar teimum spælipláss, vit vilja bara kannað møguleikarnar fyrst at gera stykkið til spælipláss, sum var ætlað til endamálið.

# Mangla grundstykki á Skála

**Skála Kommuna fer at stykkja 19 grundstykki út í ár**

ÚTSTYKKING
*Áki Bertholdsen*

Seinastu tíðina hevur trot verið á grundstykkjum í Skála kommunu. Men tá ið Kommunan er liðug við eina útstykkingarætlan, sum hon nú er farin undir, fer tað at hjálpa heilt væl.

Kári Johannesen borgarstjóri á Skála, sigur, at kommunan er farin í holt við eina útstykking við 19 grundstykkjum.

Í fyrstu syftu verður farið undir at gera tey fyrstu níggju av teimum byggibúgving. Tað arbeiðið byrjar beinanvegin.

Ognarviðurskiftini í sambandi við hini 10 grundstykkini eru ikki heilt avgreidd enn, tí lendið er ognartikið til endamálið, men onkrir av eigarunum hava mótmælt og tað má avgreiðast fyrst.

Borgarstjórin væntar tó, at málið verður avgreitt heilt skjótt, so at farast kann undir at gera stykkini byggibúgvin í summar.

Hann sigur, at kommunan hevur 23 umsóknir liggjandi frá fólki, sum vilja hava grundstykki. Um øll høvdu tikið av, fingu tey stykki nú, veit hann ikki, so tá ið tey 19 stykkini eru útvegað, man tørvurin verða áleið nøktaður.

Grundstykkini eru ímillum 550 og smáar 700 fermetrar stór og Bygdaráðið hevur avgjørt at selja tey fyri 75 krónur fermeturin, púra byggibúgvin við kloakk og vegi til.

Sostatt fer eitt stykki uppá 600 fermetrar at kosta 45.000 krónur.